# Kjak



Heri Mohr

## Ein skúlasøga

Fyri mongum árum síðani var ein vísmaður, ið eisini var kennari ella lærari, sum starvið vanliga verður kallað.

Í skúlanum kendi kennarin børnini at kenna mun á óspiltum og spiltum móðurmáli.

Kennarin var ein klókur kennari. Hann kendi nógv fólk, ið vóru einoygd og trongskygd og villleiðandi við ørvitistosi. Nøvnini á hesum málspillarum kendi hann. Hann kundi siga tey í ramsu. Sokratess – seinra s-ið er tað føroyska – villleiddi eisini fólk, men hann varð ikki tikin við í ramsuni.

Kennarin var eisini kringur í sálarfrøði (psykologi). Tey smáu í 4. flokki dugdu øll nøvnini í ramsuni. Hví børnini skuldu duga nøvnini, fingu tey sjálvandi eisini at vita.

Lærarin lærdi næmingarnar mannagongdina í talvi. Tey vistu, at á talvborðinum vóru tvey herlið hvørt við sínum kongi, frúgv, tveimum riddarum, tveimum bispum, tveimum rókum og 8 finnum. Næmingarnir dugdu at siga skák, skákmát, javnleik (remis og pat), umlop (en passant) og leypa í borg (rokera). Hann greiddi næmingunum frá, at talvið og telving, hendan ediliga heilavenjing fram um allar aðrar, kom úr India til Føroya fyri fleiri túsund árum síðani og ikki úr Danmark (Danmørk á føroyskum máli), sum einoygd og trongskygd fólk vilja vera við.

Í einum fríkorteri segði tann kviki Edmund (elstur í 7. flokki og uppkallaður eftir abbanum, sum varð nevndur í ramsuni), at í næsta talvtíma fór hann ikki at leypa í borg, men á borg, tí nú kundi tað vera nóg mikið við hesum heimagjørda føroyska møsninum. "Tí," segði hann, "um vit nakrantíð fara at fáa eitt føroyskt heimsatlas, verður tað pínadoyð so murrandi fult av nøvnum, sum bert fá úrvald – teirra millum kennarar, ið ikki vita, hvussu navnið H. C. Andersen verður stavað – fara at skilja og at leita í. Hvussu verður endin á øllum hesum hurlivásanum? Eg eri vísur í, at ikki eitt c verður at finna nakrastaðni í einum komandi heimsatlasi. Tey fýra c-ini, tað eina w-ið og tað eina x-ið, sum vórðu smoygd inn í ta føroysku orðabókina 1998, og sum útihýsti Zeus, zoologar og onnur neyðug z-nøvn og -orð, verða útraderað í eini komandi, dagførdari føroyskari orðabók. Tí hon skal jú sampakka við einum komandi heimsatlasi," segði Edmund við ein javnaldra, meðan teir yngru næmingarnir spældu í skúlagarðinum.



Dávid Isfeld
*Hósvík*

## Málstríð, ikki landafrøðiligt stríð!?

*– av bók, ið snýr seg um landafrøði*

Tað kann bert vera ein orsøk til, at tað stendst málstríð av einum føroyskum atlassi. Tað er tá tann eini parturin er vaksin upp við donskum atlassi, og heldur tað tískil vera tað mest natúrliga, og eru broytingar til føroyskt bert ein irriterandi provokatión móti tí etableraða og upprunaliga atlassinum – altso tað danska, sjálvsagt.

### Eyðun borgar fyri góðsku

Mangan havi eg lisið tað, ið Eyðun á Borg skrivar, og haldi eg hann vera heldur víðgongdan við hvørt. Hinvegin haldi eg eisini, at hann er skemtiligur og beinrakin. Hvat so um hann kanska tekur rívan til við hvørt, ella ofta, tað gjørdu reyðsokkarnir eisini, og tað eydnaðist teimum heilt væl at seta gongd á kvinnurørsluna til frama fyri líkarætt. Onkuntíð er neyðugt við hvøssum meiningum og orðum. Eyðun og onnur við honum stríða eitt ótakksamt og neyðugt stríð. Tað var ikki lagaligheit og sómi, ið vann okkum føroyskt mál í kirkju og skúla, ella føroyskt flagg á sinni. Hvar aðrastaðni í heiminum hoyra fólk um egið mál, tað, sum vit gera her? Dømi: "doyð sum tú ert føroyskur", "steiki hatta ljóðaði føroyskt". Bara føroyingar halda, at vit kunnu ljóða ov føroysk. Vit eru løgin!

### Søgulig orð vs orð í dagligari talu

Hvørt tað er rætt at nýta orð ella heiti úr eldri søgu er ein sera trupul spurningur. Hvør sigur t.d. Burgundarhólmur fyri Bornholm (vit kundu skriva "Bornhólmur", um tað skal vera føroyskt). Eg havi ongantíð hoyrt "Burgundarhólm" verið nýtt í teimum samtalum, eg havi havt, og eg havi hoyrt heilt nógv fólk siga Bornholm og ongantíð hitt heiti. So hví velja eitt heiti, sum ikki er livandi millum fólk? Vit siga jú heldur ikki Miklagarður um Istanbul, tí "Miklagarður" hoyrir eldri søgu til, og er ikki longur livandi millum fólk.

### Keyp tvey atlas!

Hví gera eitt "føroyskt" atlas, um tað ikki má vera á føroyskum einans? Um neyðugt, skriva upprunaheiti (við q, w, z, x, c) í klombrum eftir føroyska heiti. Um tað ikki er til at halda út, so keyp eitt atlas aftrat á enskum, týskum ella donskum. Eg havi eitt framúrskarandi atlas frá "The Times" og tað føroyska. Tað føroyska atlassið gevur mær "tað føroyska", sum eg ynski mær, meðan tað enska gevur mær alt annað. Hvør er trupuleikin? Gev okkum eitt føroyskt atlas, alt annað er meiningsleyst.

*Við landafrøðisligari kvøðu*
*og vón um vanligt vit og skil*



Maud Wang Hansen
*Forkvinna*
*Føroya Pedagogfelag*

## Er tað forsvarligt, at Arbeiðseftirlitið verður skert við fleiri ársverkum?

Arbeiðseftirlitið hevur eftirlit við trygdini á øllum almennum stovnum, harundir á øllum barnagørðum, spæliplássum, sambýlum, verkstøðum og stovnum, har limirnir í Føroya Pedagogfelag arbeiða.

Trygdin er tað týdningarmesta á einum arbeiðsplássi. Trygdarskeið verða gjørd til tess, at leiðslur og trygdarumboð vita, hvat teirra ábyrgd er, tá talan er um trygdarviðurskiftini á arbeiðsplássinum. Eitt er tað fysiska arbeiðsumhvørvið, eitt annað er tað sálarliga arbeiðsumhvørvið. Tað er ábyrgdin hjá trygdarumboðum at virka fyri, at tað er trygt og gott at vera á einum arbeiðsplássi. Fyri at kunna røkja uppgávurnar sum trygdarumboð til fulnar er neyðugt við tøttum samskifti við myndugleikarnar, t.e. Arbeiðseftirlitið.

Sálarliga arbeiðsumhvørvið er avgerandi fyri, hvussu fólk trívast á einum arbeiðsplássi, og tað er ein stór ábyrgd at hava at tryggja, at hesi viðurskifti eru góð. Serliga er tað trupult í løtuni, har nógv starvsfólk eru sett niður í tíð, fólk eru uppsøgd, og eingir pengar eru til avloysarar, tá starvsfólk eru sjúk ella burtur frá arbeiði. Tað merkir, at færri fólk skulu náa tað, sum fleiri áttu at gjørt, og tað sigur seg sjálvt, at hetta gongur út yvir trygdina. Arbeiðstrýstið er stórt og tænastustøðið høgt, og trygdin eigur eisini at fylgja við.

Fatanin av arbeiðsumstøðunum hjá Arbeiðseftirlitinum er, at tey ikki í nóg stóran mun hava orku til at røkja allar uppgávur við núverandi normering. Hetta er ikki ein kritikkur av tí arbeiði, sum verður gjørt, men heldur ein staðfesting av, at hetta er eitt komplekst og umfatandi arbeiðsøki. Alt ov ofta síggja vit fyribilsgóðkenningar, og tað tekur tíð at fáa tær endaligu góðkenningarnar upp á pláss. Samstundis er tað er langt ímillum skeiðini fyri trygdarumboð og leiðslur. Soppavøkstur hoyra vit ofta um á arbeiðsplássum, og er tað neyðugt, at tílíkar staðfestingar verða tiknar í størsta álvara. Hetta er bæði tíðarkrevjandi og torført at hava við at gera.

Hvussu hevur landsstýrismaðurin hugsað sær, at alt hetta blívur betri við færri starvsfólkum? Hvør tekur nú ábyrgdina av trygdini á okkara arbeiðsplássum? Út frá hesum má spurnartekin setast við avgerðina hjá Føroya Løgtingi og ætlan landsstýrismansins um at niðurraðfesta arbeiðseftirlitið!